# Stórur eftirspurningur eftir ídnaðarøkinum

**P/f Norðoya tunnilin hevur søkt um at fáa tvey grundøki á ídnaðarøkinum í Klaksvík í samband við arbeiðið upp á undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð. Hetta hevur ført við sær, at Klaksvíkar Kommuna hevur sett seg í samband við fyritøkuna Elmar Zachariassen um møguligt afturkeyp av teirra grundøki á ídnaðarøkinum**

ÍDNAÐARØKI
*Solby A. Eliasen*



*Eftirspurningurin eftir grundøkjum á ídnaðarøkinum í Klaksvík er sera stórur*

Klaksvík:P/F Norðoyatunnilin hevur søkt um at fáa tvey øki á ídnaðarøkinum. Økini talan er um , eru tvey grundøki, sum liggja eystarumegin innkoyringina til ídnaðarøkið.

Karl Heri Joensen, formaður í Teknisku nevnd í Klaksvíkar Býráð sigur við Norðlýsið fríggjadagin, at Tekniska nevnd fer at mæla býráðnum til at keypa eitt grundøki, sum fyritøkan Elmar Zachariassen eigur, aftur, soleiðis at P/f Norðoya tunnilin kann fáa teir 4.000 fermetrarnar, sum teir siga seg hava tørv fyri, meðan arbeiðið at gera tunnilin fer fram.

### Stórur eftirspurningur

Aftanfyri alt hetta liggur ein onnur søga. Fyritøkan Elmar Zachariassen eigur sum sagt eitt økið, sum liggur vestarumegin innkoyringina til ídnaðarøkið. Teir hava havt tørv á at fáa størri pláss til teirra virksemið, sum umfevnir lastbila og trailarakoyring, umframt at teir hava eitt verkstað úti á Bumshamri. Men nú tá Norðoyatunnilin hevur søkt um at fáa tvey øki á ídnaðarøkinum til teirra virksemið, hevur Klaksvíkar kommuna sett seg í samband við Elmar Zachariassen um møguligt keyp av økinum.

- Hetta er gjørt fyri ikki at missa hesi øki, sum talan er um. Tí eftirspurningurin eftir grundøkjum á ídnaðarøkinum er so stórur. So hava vit hugsað, at ein annar møguleiki er, at kommunan keypir økið frá Elmari ímóti, at hann fær bygt út á Bumshamri, har fyritøkan heldur til. Men hetta liggur alt framvegis á samráðingarstøði. Onki er avgjørt, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann sigur, at eftirspurningurin eftir økjum á ídnaðarøkinum er sera stórur. Einans trý øki eru eftir, og tað liggja, sum er, 11 umsóknir inni.

- Eg vænti, at vit kunnu koma til at stoyta onkran, um vit nú lata Norðoyatunnilin fáa tvey øki, tí tað eru so mong onnur, sum eru áhugaði í at fáa burtur av ídnaðarøkinum, sigur Steinbjørn, og leggur eina við, at her er ikki talan um, at kommunan fer at leggja seg tvøra og gera arbeiðið upp á undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð trupult.

- Vit fara at gera alt, tað vit kunnu fyri at arbeiðsfólki, sum fer at arbeiða við tunlinum skal fáa so góðar umstøður sum yvirhøvur gjørligt, sigur hann.

Steinbjørn sigur, at tað sum tað ræður um er, at finna eina virðiliga loysn fyri allar partar og samstundis vísir hann á, at tað finnast aðrir møguleikar hjá Norðoya tunlinum at fáa grundøki á ídnaðarøkinum.

- Tað eru onnur, sum eisini eiga grundøkir á ídnaðarøkinum, og tað ber til hjá Norðoya tunlinum at royna at útvega sær pláss harfrá, hóast tey økini ikki eru byggiklár, heldur Steinbjørn Jacobsen.

Tað er uppgávan hjá P/f Norðoya tunlinum at útvega sær økir til teirra virksemi, og Steinbjørn skilir væl, at tey venda sær til kommuna fyri at fáa hesi bæði økini, tí tað er tað léttasta, nevniliga tí hesi bæði økini eru byggiklár.

Hann leggur tó dent á, at málið við økinum hjá Elmari Zachariassen framvegis bert er á samráðingarstøðið og tí er onki avgjørt har enn.

- Tá vit nú fara at samráðast við Elmar Zachariassen, er tað klárt, at hann fer at koma við sínum krøvum. Fyritøkan hevur ynski um at etablera seg á Bumshamri, har tey halda til frammanundan, og kunnu vit koma til eina avtalu har, sum báðir partar kunnu liva við, er tað jú bara gott, sigur borgarstjórin og leggur aftur at, at tann bráðneyðugi tørvurin hjá Elmari Zachariassen er at fáa pláss til allar bilarnar, sum í dag standa parkeraðir ymsastaðni runt í Klaksvík, tí økið á Bumshamri, sum tað sær út í dag, er alt ov lítið.

Grundøkini á ídnaðarøkinum, sum talan er um, eru 2.300 fermetrar til støddar. Økið, sum fyritøkan hjá Elmari Zachariassen stendur í boði at fáa á Bumshamri, um avtala verður gjørd millum partarnar, er umleið 4.000 fermetrar.

Lurtarakanning hjá ÚF:

# Sama mynstur – lægri tøl

**Ein lurtarakanning sum Útvarp Føroya lat gera fyrr í vár vísir, at føroyingar lurta mest eftir útvarpinum, tá høvuðstíðindasendingarnar eru. Og hóast ein lækking er í tølunum, so sigur Jógvan Jespersen, stjóri, at tað kann staðfestast, at Útvarp Føroya framvegis hevur nógvar lurtarar**

LURTARAKANNING
*Solby A. Eliasen*

Kanningin vísir, at í meðal lurta 60 % av føroyingum eftir tíðindunum á døgurða, meðan 70 % lurta eftir tíðindasendingini á kvøldi. Og so liggur talið um tey 30 til 40 %, sum lurta gjøgnum dagin.

Men Jógvan Jespersen sigur, at talið á lurtarum gjøgnum ein heilan dag er sera skiftandi. Men liggur fyri tað mesta millum 30 og 40 %.

- Hetta er tað sama mynstrið, sum ein kanning, sum vit gjørdu í 1996 vísti, men tað er ein lækking farin fram í tølunum, kortini, sigur Jógvan Jespersen.

Men hann leggur afturat, at tað undrar tey ikki, at lurtaratølini eru farin eitt vet niður, tí tað er so nógv hent síðani 1996.

- Tað eru komin so avbera nógv onnur tilboð síðani tá. Til dømis internetið, aðrar lurtara rásir og eisini eru munandi betri tilboð at fáa innan sjónvarpsheimin, vísir útvarpsstjórin á.

Hann sigur, at sjálvandi vil Útvarpið altíð hava so nógvar lurtarar sum gjørligt, og ein tílík kanning gevur teimum betur innlit í, hvat tann einstaki lurtarin heldur. Tað er so, at í kanningini, sum varð gjørd í vár, kundi lurtarin eisini koma við sínum boði uppá, hvat kundi havt verið gjørt øðrvísi ella betur.

- Á henda hátt kunnu vit eisini nýta eina tílíka kanning til íblástur til framtíðina. Tað er sera áhugavert at fáa at vita, hvat lurtarin heldur.

Henda kanningin var umfatandi, tað vil siga, at nógv fólk vórðu spurd. Tað bleiv ringt til umleið 200 lurtarar hvørt kvøld í eina viku, og tá avtornaði vóru 1.620 fólk við í kanningini.

Jógvan Jespersen sigur, at tey høvdu kunnað hugsað sær at gjørt tílíkar lurtarakanningar oftari, tí tær eru vælegnaðar at nýta sum íblástur til framtíðina.

Nú er summarið farið aftur um bak, og veturin stendur fyri durum. Og tað merkir, at Útvarp Føroya skiftir frá summarskrá til vetrarskrá.

- Skiftið frá summarskrá til vetrarskrá fer spakuliga fram í ár. Nakrar broytingar eru farnar fram, og í næstu viku skuldi allar broytingarnar verið gjørdar, og so er vetrarskráin komin upp á pláss, sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Útvarpi Føroya at enda.



*Lurtarakanningin hjá Útvarpi Føroya vísir, at føroyingar lurta mest eftir útvarpinum, tá høvuðstíðindasendingarnar eru*



# Skattalætti skal fíggjast við sparingum

**– Skattalættin upp á 50 millliónir krónur skal fíggjast við almennum sparingum, og eydnast tað ikki landsstýrismonnunum at finna pengarnar verður eingin skattalætti næsta ár, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum. Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini, setir hart móti hørðum: - Samgongan hevur bundið seg til at lækka skattin, og tí skulu pengarnir finnast, so ella so, sigur fíggjarnevndarformaðurin**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Skattalættin uppá 50 milliónir verður bara veittur, um landsstýrismenninir megna at finna sparingar, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum. – Samgongan hevur skrivað undir uppá, at skattalætti skal veitast, og tí skulu pengarnir útvegast, um neyðugt úr gjaldførinum, tvs. úr Landsbankanum, sigur Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini*

Tá samgonguskjalið varð undirskrivað 6. juni í ár bundu teir fýra flokkarnir seg til at lækka skattin við 115 milliónum krónum, tvey tey fyrstu árini av samgonguskeiðinum. Eftir hesi ætlan skal skatturin lækka umleið 50 milliónir krónur, longu 1.januar næsta ár. Men í uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, sum varð lagt fram mánadagin, er ikki pláss til skattalættar. Yvirskotið er 150 milliónir krónur, men landskassin hevur bundið seg til at gjalda 148 milliónir krónur í avdráttum av láninum úr ríkiskassanum, og tí eru bara tvær milliónir eftir, tá avdráttirnir eru goldnir.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at fíggjarlógaruppskotið fyri næsta ár er gjørt út frá teimum fortreytum, sum eru galdandi í løtuni, og tí er skattalættin ikki tikin við. Fleiri lógarbroytingar skulu gerast, áðrenn skattalættin kann veitast, og tað arbeiðið fer í gongd nú. Landsstýrismaðurin ásannar, at fíggjarlógaruppskotið, sum tað sær út í løtuni, ber ikki nakran skattalætta, og tí verður neyðugt at finna tær 50 milliónirnar við at fremja sparingar. Og sparingarnar skulu finnast, áðrenn fíggjarlógin verður endaliga samtykt, væntandi síðst í desember.

– Tað er púra greitt, at skattalættin skal fíggjast við sparingum, og tí verður tað nú uppgávan hjá landsstýrismonnunum at fáa sparingar framdar, sigur Karsten Hansen. Hann leggur afturat, at ynskja landsstýrismenninir ikki at spara, ella eydnast tað ikki teimum at fremja sparingar, so kemur einki uppskot um skattalætta frá fíggjarmálaráðharranum. Eisini skal fíggjarlógaruppskotið gjøgnum eina drúgva viðgerð í Løgtinginum, og tí er møguligt, at fleiri broytingar verða gjørdar, áðrenn fíggjarlógin fyri 2003 verður endaliga samtykt.

Fyrsta viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum verður týsdagin í næstu viku, og síðan skal tað í tveimum umførum í Fíggjarnevndina – millum fyrstu og aðru viðgerð, og millum aðru og triðju viðgerð. Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini, ætlar sær at fylgja væl við, hvør lagnan verður hjá skattalættanum, sum samgongan hevur bundið seg til at fáa framt.

– Samgonguflokkarnir hava skrivað undir uppá at skattatrýstið skal lækka við 115 milliónum eftir tveimum árum, og hetta skal haldast – alt annað er avtalubrot, sigur Óli Breckmann. Tí fer hann at tryggja sær, at skatturin skal lækka við 50 milliónum næsta ár.

### Hvør skal gjalda

Karsten Hansen, landsstýrismaður, hevur ikki stórvegis hug at gera viðmerkingar til, hvar almennar sparingar skulu fremjast ella hvussu nógv hvør landsstýrismaður í sínum lagi skal spara, fyri at skattalættin uppá 50 milliónir krónur kann fíggjast.

– Eg kann bara siga, at arbeitt verður við at fáa framt sparingarnar, og peningurin verður funnin í heyst, sigur Karsten Hansen. Hann vil ikki nevna nakað dømi um, hvar hann kundi hugsað sær at framt sparingar, men sigur tó, at talan verður ikki um at siga fólki úr starvi av hesi orsøk. Karsten Hansen leggur afturat, at hóast skotbráið er stutt, so væntar hann, at tað fer at eydnast at finna sparingarnar.

Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini, sigur, at hann í fyrstu atløgu ikki fer at leggja seg so nógv út í, hvar sparingarnar verða framdar. Men hann vísir samtíðis á, at sparingar eiga í høvuðsheitum at verða framdar hjá teimum landsstýrismonnum, sum hava fingið økta játtan næsta ár, sammett við í ár. Við hesum sipar hann serliga til stóru málsøkini Almannamál, Familju- og heilsumál, umframt Útbúgving og gransking. Á fíggjarlógini 2002 eru útreiðslurnar til Almanna- og Heilsumál 1.652 milliónir, men í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár eru útreiðslurnar til málsøkið, sum nú er býtt upp í Familju- og heilsumál og Almannamál, øktar við 73 milliónum krónum, upp í tilsamans 1.725 milliónir krónur. Útreiðslurnar til málsøkið Útbúgving og gransking eru á fíggjarlógini fyri 2002 settar til 651 milliónir, men næsta ár vaksa útreiðslurnar til hetta málsøki upp í 678 milliónir. Útreiðslurnar til málsøkið Fíggjarmál økjast næsta ár við 16 milliónum upp í 216 milliónir, meðan útreiðslurnar til Fiskivinnumál vaksa úr 169 milliónum upp í 174 milliónir. Harafturímóti eru útreiðslurnar til málsøkið Vinnumál lækkaðar úr 339 milliónum á fíggjarlógini í ár niður í 333 milliónur næsta ár. Játtanin til Oljumál hækkar úr 24 upp í 29 milliónum krónum. Í øllum tølum er bara talan um rakstrarútreiðslur og ikki íløgur.

Óli Breckmann sigur seg ivast í, um teir landsstýrismenninir, sum hava fingið eina økta játtan í fíggjarlógaruppskotinum næsta ár, yvirhøvur hava hug at fremja nakrar sparingar.

– Eg má siga, at tað kemur rættuliga óvart á, at hædd als ikki er tikin fyri skattalættanum í fíggjarlógaruppskotinum. Eg havi higartil fingið at vita, at skattalættin var tikin við í uppskotið, og tí kann tað tykjast, sum um Karsten Hansen nú roynir at smoyggja sær undan at lækka skattin, sigur Óli Breckmann. Hann leggur afturat, at skatturin skal lækka, sjálvt um eingin vilji verður at fremja almennar sparingar.

– Vísir tað seg seinni í heyst, at landsstýrismenninir ikki megna at lækka útreiðslurnar við 50 milliónum krónum, so noyðast vit at taka henda pening av gjaldførinum hjá landskassanum, tvs. úr Landsbankanum, sigur ein avgjørdur Óli Breckmann. Hann vísir á, at við eini fíggjarlóg, har yvirskotið, eftir at avdráttirnir eru goldnir, bara er tvær milliónir, er stórur vandi fyri, at neyðugt kortini verður at fara í Landsbankan eftir pengum, kemur okkurt óvart á.

Páll á Reynatúgvu:

# Vandi fyri, at almannaøkið skal spara

**Almannamál eru nógv størsti parturin av útreiðslunum hjá landskassanum, og tí kann væntast, at stórur partur av teimum 50 milliónunum, sum skulu sparast í heyst, skulu finnast her. Páll á Reynatúgvu ynskir ikki at seta skerjingar á almannaøkinum upp í móti skattalættanum, sum samgongan hevur bundið seg til at veita**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Útreiðslurnar til málsøkið Almannamál eru í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár mettar til 1.229 milliónir krónur. Harumframt eru tilsamans 25 milliónir krónur settar av til íløgur á økinum, 20 milliónir til eldrasambýli og fimm milliónir til bústovnar til serforsorgina. Í ár, eins og undanfarin ár, hava Almanna- og heilsumál verið eitt málsøkið, men sum kunnugt eru hesi øki nú býtt upp í tvey, við hvør sínum landsstýrismanni.

Nú tað er greitt, at landsstýrismenninir komandi mánaðirnar skulu finna sparingar fyri tilsamans 50 milliónir krónur, er Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, greiður yvir, at hansara økið eisini kann verða rakt av sparingum.

– Tað er greitt, at almannamál er eitt stórt og tungt málsøki, sum fer við stórum parti av fíggjarlógini, og tí kann væntast, at partur av pengunum til skattalætta skal finnast her, sigur Páll á Reynatúgvu. Hann vísir tó samtíðis á, at eitt samt landsstýri hevur sett sær fyri at raðfesta almannamál, og serliga eldraøkið og serforsorgina, hægri næsta ár, sammett við undanfarin ár.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur ikki stórvegis hug at gera viðmerkingar til, hvørt hann heldur kundi hugsað sær at varðveitt játtanina, hann hevur fingið í fíggjarlógaruppskotinum, heldur enn at framt sparingar, so skattalættin kann gerast veruleiki.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at samantvinna uppraðfestingina av almannaøkinum við spurningin um skattalætta, sigur Páll á Reynatúgvu. Hann sigur, at sjálvandi fer tað at merkjast, verður neyðugt at fremja sparingar á almannaøkinum, men hann vil tó ikki siga, hvar spariknívurin fyrst fer at raka, gerst tað neyðugt. Páll á Reynatúgvu sigur, at arbeitt verður í løtuni við rationaliseringum, m.a. í samband við at alt eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar næsta ár. Men hesar rationaliseringar eru tó ikki so langt ávegis, at tær gera nakran mun í samband við fíggjarlógaruppskotið fyri næsta ár.